

# NORÐURLANDAHÚSIÐ **TILTØK APRÍL 2004**

Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-17.00
og sunnudagar kl. 14.00-17.00
NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM
Telefon nr. 317900 · Telefax nr. 319790
www.nlh.fo · e-mail: nlh@nlh.fo

## TILTØK APRÍL 2004

- **Listaframsýning við grafiskari list hjá Ase Bømler (FO) er í húsinum til 18. apríl**
- **Listaframsýning hjá listamanninum Lennart Iverus (SE) er í húsinum til 18. apríl**
- **Framsýningin »Veiðimentan« er á Etnografisk Museum í Stockholm**

HÓSDAGUR 1. APRÍL
**Kl. 19.30 Orfeuskonsert (FO).**
Monika Stauss Joensen (FO) violin og Ólavur Jakobsen (FO) guitar. Spæld verða eldri og yngri klassisk verk. Nærri um skránna á www.nlh.fo.

LEYGARDAGUR 3. APRÍL
**Kl. 17.00 Sjónleikurin „Kaktusblóman“**
Klaksvíkar Sjónleikarafelag (FO)
Atgongumerki kr. 125.- verða seld í Kunningarstovuni í Havn og Norðurlandahúsinum.

MIKUDAGUR 7. APRÍL
**Kl. 19.00 Suzuki næmingakonsert (FO).**
Fyriskipari er Suzukifelagið í Føroyum. Ókeypis atgongd.

HÓSDAGUR 8. APRÍL
**STONGT Skírisdagur**

FRÍGGJADAGUR 9. APRÍL

**STONGT Langi fríggjadagur**

LEYGARDAGUR 10. APRÍL
**STONGT Páskaaftan**

SUNNUDAGUR 11. APRÍL
**STONGT 1. Páskadagur**

MÁNADAGUR 12. APRÍL
**STONGT 2. Páskadagur**

MIKUDAGUR 14. APRÍL
**Kl. 20.00 KLIPP**
Filmsfelag Norðurlandahúsins (FO) vísir finska filmin „Sibelius“. Leikstjóri er Timo Koivusalo. Filmurin er frá 2003 (120min). Atgongumerki á 60.- kr. eru at fáa í húsinum

HÓSDAGUR 22. APRÍL
**Kl. 09.00 KT-messa.**
Fyriskipari er Virkisráðgeving.

FRÍGGJADAGUR 23. APRÍL
**Kl. 09.00 KT-messa.**

SUNNUDAGUR 25. APRÍL
**Flaggdagur. Opið sum sunnudag kl. 14.00-18.00**

**Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-18.00 og sunnudagar kl. 14.00-18.00**

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
**Telefon nr. 317900. Telefax nr. 319790**
**www.nlh.fo e-mail: nlh@nlh.fo**

# FLEIRI STÓR NØVN Á LISTASTEVNUNI

**Listastevnan 2004: Umframt Jethro Tull eru heimsgitna operasangarinnan Kiri Te Kanawa, The Celtic Tenors og okkara egni Teitur Lassen á plakatini hjá Listastevnuni í august**


Foto: John Swannell

1. apríl byrjar forsølan til fleiri høvuðsnøvn á Listastevnuni 2004, sum verður í døgunum 6. til 15. august. Og uttan at taka nakað frá hinum árunum kann staðfestast, at hetta helst verður tann stevnan higartil, sum hevur tey størstu nøvnini á skránni. Atgongumerki til legendarisku Jethro Tull hava longu verið til sølu eina tíð. Øll sitiplássini vórðu útseld eftir fáum tímum, og nú eru bara góð 100 standipláss eftir.

### Kiri Te Kanawa

Tað størsta navnið á ársins Listastevnu er kortini Dame Kiri Te Kanawa. Øll kennast ikki við navnið, men hon er helst tann kendasti kvinnuligi operasangarin í øllum heiminum í dag. Hon er at líkna við Marie Callas á okkara døgum, og navn hennara verður sett stórt upp á teimum fremstu operahúsunum; bæði tá ið hon er solistur ella bara luttekur.

Kiri Te Kanawa er avgjørt tað størsta navnið, sum nakrantíð hevur vitjað hendanvegin, og tað er ikki av ongum, at bretar hava heiðrað hana við aðalheitinum Dame Kiri Te Kanawa. Hon er fødd í Ný Sælandi í 1944 og hevur maori-blóð í æðrunum. Longu sum 20 ára gomul gjørdi hon um seg í suðurhøvum, men tað var eftir, at hon var flutt til London, at hon við eitt fekk stjørnustatus, tá ið hon kom fram fyrstu ferð í Royal Opera House, Covent Garden í 1971. Síðan hevur hon verið ein tann fremsti sopranurin innan fyri operasang, men eisini í øðrum høpi hevur hon gjørt vart við seg. Hon hevur millum annað sungið musical, eitt nú á útgávuni West Side story, sum Leonard Bernstein sjálvur stjórnaði.

Tað er sostatt einki minni enn ein fongur at fáa Dame Kiri Te Kanawa hendanvegin, og kostnaðurin á konsertini er hareftir. Eitt atgongumerki kostar 950 krónur. Tað slær øll met, men tað er prísurin fyri at fáa so stóra heimsstjørnu hendanvegin. Konsertin við Kiri Te Kanawa verður 7. august kl. 19.30 í Norðurlandahúsinum.



### Celtic Tenors

Heilt so dýrir eru Celtic Tenors ikki. Atgongumerkjasølan byrjar somuleiðis 1. apríl og kostar 225 krónur.

Celtic Tenors er felags heiti fyri teir tríggjar væl umtóktu írsku tenorarnar Matthew, Niall og James. Sagt verður um teir, at teir eru millum tær bestu røddirnar, sum fram eru komnar síðstu tjúgu árini. Teir eru ungir, syngja traditionellan írskan tónleik í nýggjum hami og gera egnar útsetingar av kendum songum. Ein fløga, sum hevur verið væl umtókt er fløgan „Irish Album“, sum millum annað er útgjørd við fleiri løgum eftir Dubliners, sum føroyingum altíð hevur dámað væl.

Í 2000 skrivaðu Celtic Tenors sáttmála við EMI Classics, og teirra feskasta fløga á hesum plátuforlagnum er „So strong“, sum kom út í 2002. Seks av løgunum eru framleidd av Mike Moran, ið hevur arbeitt saman við nøvnum sum Paul McCartney, Eric Clapton, Placido Domingo og Queen bara fyri at nevna nøkur.

Eitt av løgunum er ein innilig útseting av sanginum Love of My Life, sum er innspæld til heiðurs fyri Freddy Mercury í sjálvum Abbey Road Studio, har Beatles einaferð broyttu tónleikaheimin.

Á føroysku konsertini, sum verður fríggjakvøldið 6. august klokkan 19.30 í Norðurlandahúsinum, fara Celtic Tenors at syngja bæði operu, musical og írskar sangir.

### Teitur við bólki

Okkara egni Teitur Lassen verður eisini eitt høvuðsnavn á Listastevnuni. Teitur kemur til Føroya at halda higartil einastu konsertina í ár, eftir at hann hevur ferðast dúgliga aftur og fram um Atlantshavið og sungið og spælt mest sum út í eitt, síðan fløgan „Poetry and Aeroplanes“ kom út hjá Universal í fjør.

Amerikanarar hava rættiliga fingið oyruni upp fyri Teiti, og tað sigur ikki so lítið, at fleiri viðurkend tónleikatíðarrit mettu fløguna „Poetry and Aeroplanes“ at vera millum tær týdningarmestu, sum komu út í USA í 2003.

Teitur hevur í avtaluni við Universal bundið seg til at geva enn eina fløgu út á heimsins størsta plátuforlagi, so ævintýrið heldur í øllum førum fram eina tíð afturat. Føroyingar fáa hesaferð høvi at uppliva Teit saman við orkestri sínum, sum hann ferðast við.

Konsertin við Teiti verður í Salinum í Norðurlandahúsinum 11. august 19.30.



# KAKTUSBLÓMAN LENDIR Í HAVN

**Sjónleikur: Klaksvíkingar hertaka Havnina nakrar dagar í apríl, tá ið Klaksvíkar sjónleikarafelag sýnir leikin „Kaktusblóman“. Leikurin varð sýndur fyrstu ferð í Klaksvík tann 21. februar og hevur eisini ferðast kring landið. Nú lendir leikurin, sum upprunaliga er franskur, í Norðurlandahúsinum**

„Fleur de Cactus“ er skrivaður av Jean Pierre Gredy og Pierre Barrliet. Andreas Justesen av Viðareiði hevur týtt til føroyskt, og Egi Dam hevur leikstjórnað sjónleikarunum, ið eru Adelborg Linklett, sum júst hevur fingið Ársins Herðaklapp, Jan Gardar, Petur Simonsen, Durita Samuelsen, Ann Mari Jóhannesen, Bjarni Z. Dahl, Hans Hjalti Skaale og Aðalbjørg Linklett. Edward Fuglø er pallstjóri.

Talan er um ein glantrileik. Ríki tannlæknin Julius er ein rættiligur konufólkarevur sum ræðist giftarmál. Fyri at sleppa undan at koma í klórnar á einari giftisjúkari frillu finnur hann upp á konu og trý børn, sum hann sigur seg hava.

Sjónleikurin gongur væl, til Julius verður forelskaður í Antoniu. Hann vil giftast henni, men hon krevur at hitta konuna og børnini fyri at tryggja sær, at hon ikki knúsar familjuna. Julian finnur upp á ráð og fær vinir, kenningar og onnur at spæla við fyri at bjarga honum. Hann fær sín tannlæknahjálpara, sum í loyndum er ásttikin í honum, at spæla konu og alt fløkist í ein ellibita.

Lygnir og misskiljingar fúka um oyruni, so talan verður um eina rættiliga farsu, ið Klaksvíkar sjónleikarafelag hevur gjørt til sítt vørumerki.

„Kaktusblóman“ verður sýnd í Norðurlandahúsinum leygardagin 3. apríl.

# STÓR RÁÐSTEVNA UM KUNNINGARTØKNI

**KT2004:** Í døgunum 22. og 23. apríl verður stór KT-stevna í Norðurlandahúsinum. Góðir 20 framsýnarar fara at vísa tað nýggjasta, sum føroysk kunningartøkni hevur at bjóða.

Á KT-stevnuni eru virki, feløg og stovnar í Føroyum, ið bjóða seg fram sum veitarar av vørum, tænastum og skipanum við kunningartøkni. Málbólkurin er fyrst og fremst vinnan, almennir stovnar og skúlar, men annars eru øll vælkomin, sum vilja rinda 450 krónur fyri hvønn dagin. Ráðstevnan er skipað sum framsýning, fyrilestrar og kjak. Fyrilestrar verða hildnir í Útvarpshøllini, har danirnir Carsten Graff, filosoffur, og Preben Mejer, menningarstjóri hjá TDC, umboða hvør sína síðu av hálovaðu kunningartøknini. Eitt tema er trygd, og harafturat verður eitt pallborð skipað, har framtíðin hjá føroysku kt-vinnuni verður sett á dagsskránna.

# BØRN VÍSA SÍNI KYNSTUR Í KLINGRUNI

**Suzuki-konsert:** Stór konsert við føroyskum og útlendskum børnum verður í Klingruni í Norðurlandahúsinum. Eini 50 føroysk børn og 30 útlendsk børn úr Belgia, Danmark og Íslandi framføra, og felags fyri tey er, at øll hava lært at spæla sítt ljóðføri eftir sonevnda Suzuki-háttinum

Suzuki-hátturin varð skaptur av Dr. Shinichi Suzuki og hevur gingið sanna sigursgongd um allan heim. Grundarlagið fyri framferðarháttinum er, at barnið lærir tónleik á sama hátt, sum tað lærir sítt móðurmál.

Børnini byrja heilt tíðliga, og undirvísingin er treytað av trimum pørtum: Barninum, lærara og foreldrum. Tey ganga saman og gera ein avtalu um, at støði verður tikið í fortreytunum hjá barninum. Barnið má ongantíð tvingast ella revsast, men tað má heldur enn gjarna stimbrast. Úrslitini vísa seg at vera góð.

Konsertin við føroyskum og útlendskum Suzuki-næmingum verður í Klingruni í Norðurlandahúsinum mikudagin 7. apríl klokkan 19.00

# VEIÐIMENTANIN FLYTIR TIL SVØRÍKIS

**Framsýning:** Ferðandi framsýningin „Veiðimentan í útnorði“ hevur verið sýnd fram í hølunum hjá Norðuratlantisku Bryggjuni í Keypmannahavn, síðan húsið lat upp 27. november í fjør. 11. apríl verður hon tikin niður og flutt til Svøríkis, og 23. apríl letur hon uppaftur í Etnografiska museet í Stokkhólmi.

Framsýningin, sum lýsir veiði og fiskarí í Grønlandi, Føroyum og Íslandi í listarligum, fólkaminnisligum og tøkniligum ljósi, hevur verið nógv eftirspurd. Hon lat upp í Norðurlandahúsinum hin 15. juni 2002 og hevur síðan ferðast til Sumberg Head í Hetlandi, Dublin í Írlandi, Reykjavíkar og Akureyri í Íslandi, Nuuk í Grønlandi, St. John's í Ný Fundlandi og at enda Keypmannahavnar. Nú gongur leiðin so til Stokkhólm.

FILMAR, FRUMSÝNDIR Í APRÍL:

# KLIPP SÝNIR SIBELIUS

**Klipp: Sjeyndi og seinasti filmurin á skránni hjá Klippi, Filmsfelagi Norðurlandahúsins, er Sibelius.**

Filmurin, sum er spildurnýggjur, lýsir lívið, kærleikan og tónleikin, hjá kendasta tónaskaldi finnlendinga, Jean Sibelius. Karmurin um søguna er hin gamli Sibelius, sum í húsunum „Ainola“ minnist aftur á barnaárini, tá hann sum tvey ára gamal gerst faðirloysingur. Vit fylgja tónaskaldinum lestrarárini í Helsingfors, Berlin og Wien og fáa innlit í stríðið hjá hinum aldrandi Sibeliusi, tá hann berjist við áttindu symfoniina, sum allur heimurin bíðar eftir. Han avbyrgir seg frá verðini og blakar lidnu symfoniina á bálið. Men alla tíðina hevur hann Aino við liðina. Timo Koivusalo er leikstjóri og Martti Suosalo hevur leiklutin sum Sibelius.

**Filmurin „Sibelius“ verður sýndur hin 14. apríl 2004. Prísur á atgongumerkjum er 60 krónur.**

# FRAMSÝNING ENDAR VIÐ BÁLI OG BRANDI



**Listaframsýning:** Tvær listaframsýningar eftir ávikavist Aase Bømler Olsen og Lennart Iverus hava hingið í Norðurlandahúsinum síðan mars, og tað gongur heitt fyri seg, tá ið tær enda.

Aase Bømler Olsen sýnir fram størri verk í Klingruni, og Lennart Iverus hevur sínar tekningar og málningar hangandi á veggjunum í Dansistovuni.

18. apríl enda báðar sýningarnar, og tað gongur ikki stillisliga fyri seg. Verkini hjá Aase Bømler Olsen verða rætt og slætt brend, tá ið tey verða tikin niður.

Aase sigur við sínari framsýning frá eini søgu. Íblásturin hevur hon fingið úr yrkingini „Fyrtårnet ved Montséger“ hjá Finn Langgard. Yrkingin er skrivað til minnis um 16. mars 1244, tá ið 205 katharar gingu syngjandi yvir til trúvillingabálið við borgina Montséger í Suðurfraklandi. Plássið nevnist enn „Pláss teirra brendu“.

Aase Bømler Olsen varpar við síni framsýning ljós á frælsi og kærleika. Hetta eru grundleggjandi virði, ið vit ongantíð mugu taka fyri givið, er boðskapurin hjá Aase Bømler Olsen, sum rættiliga fær hesi hugtøk aftur í brennidepilin, tá ið hon setir eld á síni listaverk uttan fyri Norðurlandahúsið 18. apríl.

# GUITAR OG FIÓLKONSERT Í ORFEUS-RØÐINI

**Orfeus:** Næsta klassiska konsertin í Orfeus-røðini verður 1. apríl, tá ið Monica Stauss Joensen og Ólavur Jakobsen fara at spæla verk fyri ávikavist fiól og guitar.

Hendan Orfeus konsertin verður merkt av italskum tónum og verk verða leikt eftir m.a. Tartini, Giuliani og Paganini, ið bæði var frálíkur guitar- og fiólleikari.

Umframt italska tónleikin, eru eisini smærri verk á skránni. Tónleikur eftir Villa-Lobos úr Brasilia, Czardas úr Ungarn, og skemtiligur og lættur tónleikur eftir William Kroll, verður at hoyra.

Monika og Ólavur fara eisini at framføra hvør sítt soloverk á ávikavist violin og guitar. Monika leikar verk skrivað til hennara av amerikumanninum Frédéric Balazc, meðan Ólavur vendir sær til italska úrmælingin Mauro Giuliani, og framførir eitt av hansara tórførastu verkum.

Konsertin verður í Klingruni 1. apríl klokkan 20.00